# Spurnarkapping í Stóra Pakkhúsi



*Fleiri tiltøk eru á skránni í Stóra Pakkhúsi í Vági komandi mánaðirnar. Byrjað verður við spurnarkapping í kvøld*

*savnsmynd*

**Stór spurnarkapping fer av bakkastokki leygarkvøldið í Stóra Pakkhúsi í Vági. Mong tiltøk eru annars á skránni komandi mánðirnar, nú karmarnir eisini eru betri, t.d. hevur húsið nú hálvt skonkiloyvi. Húsið verður eisini opið ávís kvøld, har tiltøk til ung eru á skránni í rúsfríum umhvørvi**

MENTAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Nógv virksemi hevur verið í Stóra Pakkhúsið í Vági, síðani tað varð gjørt í stand og lat upp fyri á leið tveimum árum síðini.

Skráin fyri fyrstu mánaðirnar í 2004 er løgd og mangt forvitnisligt er á skránni.

Lagt verður fyri leygarkvøldið, í kvøld, har fyrsta umfar av umfatandi spurnarkapping er á skránni. Aftan á er Syng Við kvøld. Lagt er soleiðis tilrættis:

Spurnarkappingini verður millum hesi grannaløg/býlingar, sum kunnu velja upp til 4 umboð at umboða seg í spurnarkappingini:

1) Vestanfyri Gjógvará
2) Uttanfyri Gjógvará og vestanfyri brekkuna hjá Jørgen Olsen
3) Uttanifyri brekkuna hjá Jørgen Olsen til Skála
4) Frá Skála til Toftaá
5) Frá Toftaá til Tippisá
6) Frá Tippisá út á Marknaðaroyri
7) Inni í Líðini, íroknað Yviri á Bakka og við Kráir
8) Neslíð og á Nesi

### Evnini í spurnarkappingini eru hesi

- Landalæra
- Politikkur
- Ítróttur
- Søga & mentan
- Myndir & Media

Tilsamans verða 3 umfør, 2 innleiðandi og eitt finaluumfar. Innleiðandi umførini verða skipaði soleiðis, at 2 umfør verða hvørt kvøld, har 2 lið kappast móti hvørjum øðrum. Finalu-umfarið verður skipað við hálvfinalum og finalu.

Kvøldini eru fastløgd soleiðis:

1. Umfar: Leygarkvøldið 31. Januar (kl. 20.00 - húsið letur upp kl. 19.30)
2. Umfar: Fríggjakvøldið 6. Februar (kl. 20.00 - húsið letur upp kl. 19.30) (fríggjakvøld, tí steypafinaluni hjá kvinnum er leygardagin 7. feb)

Finalu Umfar:
Leygarkvøldið 6. Mars (kl. 20.00 - húsið letur upp kl. 19.30)

Óli Holm og Páll Augustinussen eru høvuðsdómarar.

Spurnarkappingin verður á stórskíggja, soleiðis at áhoyrarin/hyggjarin fær nakað burturúr.

**Lutakast hevur verið og"liðini" hittast soleiðis:**

**1. Umfar (31. jan.)** Frá Skála til Toftaá - Uttanifyri brekkuna hjá Jørgen Olsen til Skála

**2. Umfar (31. jan.)** Uttan fyri Gjógvará og vestan fyri brekkuna hjá Jørgen Olsen - Neslíð og á Nesi

**3. Umfar (6. feb.)** Frá Tippisá út á Marknaoyri - Vestanfyri Gjógvará

**4. Umfar (6. feb.)** Frá Toftaá til Tippisá - Inni í Líðini, íroknað Yviri á Bakka og við Kráir

Í samband við hvørja spurnarkapping verður Syngið við kvøld í Stóra Pakkhúsi - eftir spurnarkappingina verður sungið og harmonika / guitarur spælir undir.

Ásett er 16 ára aldursmark.

Upplatingartíðir í samband við spurnarkappingina í Stóra Pakkhúsi

Leygarkvøldið 31. jan. er húsið opið frá 19.30 - 04.

Fríggjakvøldið 6. feb. er húsið opið frá kl. 17.00 - 04.

Leygarkvøldið 6. mars. er húsið opið frá 19.30 - 04.

Stigtakararnir vænta nógv fólk til tiltakið, tí vanligt hevur fyrr verið við spurnarkappingum í Vági og vóru hesar vælumtóktar.

### Fingið loyvi

Húsið er annars opið fastar tíðir; týsdag frá 19 til 23 er rúsfrítt kvøld, ætlað ungum. Fríggjadag er opið frá 17 til 20 og leygardag frá 20 til 01.

Annars er regluliga, fyri ikki at siga nærum dagliga, fótbóltur á stórskíggja og verður hetta lýst nærri við plakatum á vanligu støðunum.

Føstulávintsdansur verður í Pakkhúsinum føstulávintsleygarkvøld, har Trio av Tvøroyri spæla til dansin.

Húsið hevur fingið sonevnt hálvt skonkiloyvi og er hetta sera hent í samband við matkvøldini við gestakokkum, ið eru av og á. Hesi kvøld eru sera væl umtókt og ætlandi verður fyrsta matkvøld í ár í marsmánað.









# Skal koma býráðnum í Havn aftur um brekku

**– Tórshavnar Býráðið skal ikki sleppa snikkaleyst burturúr at fara soleiðis við starvsfólki sínum, sum tey hava gjørt, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum**

STARVSFÓLKA-POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Hetta er so ófatiliga langt úti, at tað fer at koma býráðnum í Havn aftur um brekku, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í starvsmannafelagnum*

– Hetta skal Tórshavnar Býráð ikki sleppa snikkaleyst burturúr!

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, er rættiliga avgjørdur, tá ið vit hittu hann í telefonini í gjáramorgunin.

Hóskvøldið var hann vitni til eina viðgerð í býráðnum í Havn, sum hann kallar heilt ófatiliga langt úti.

Á býráðsfundinum hóskvøldið samtykti meirilutin í Tórshavnar býráð nýggjar reglar fyri starvsfólkini, sum vit greiða frá í hinari greinini her á síðuni.

Í stuttum ganga hesar reglarnar út uppá, at fara starvsfólk hjá býráðnum privat ørindi í arbeiðstíðini, skulu tey dragast í løn.

Sum dømi um privat ørindi varð nevnt, at fara tey til lækna ella til tannlækna í arbeiðstíðini, skulu tey dragast í løn.

Og skulu tey at fylgja líki, verða tey eisini drigin í løn, uttan tá ið talan er um næstu skyldfólk.

– Hvør skal avgera, hvør eru næstu skyldfólk, spyr Gunnleivur Dalsgarð. Tað eru so nógv, sum mugu sigast at vera næstu skyldfólk, uttan at hava pappír uppá tað, sigur hann.

Hann sigur eisini, at tað er ein elligomul, føroysk siðvenja at fólk vísa teimum sum fara virðing, uttan at verða drigin í løn fyri tað.

### Sleppa ikki snikkaleyst

Starvsmannafelagið metir, at hesar reglarnar eru so stórar bróytingar í arbeiðsviðurskiftunum, at talan er um sáttmálabrot.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at tað er eisini brot á gamla siðvenju, sum starvsfólkini hava rætt til, hóast tey ikki eru niðurfeld í sáttmála.

– Talan er um gamlar siðvenjur, sum ætlanin er at broyta so at tað fer at fáa fíggjarliga avleiðingar fyri starvsfólkini. Hetta er tað mest álvarsliga í øllum málinum, tí gamlar siðvenjur kunnu ikki broytast einvíst.

Hann leggur eisini dent á, at Tórshavnar Býráð skal ikki sleppa snikkaleyst burturúr hesum her at broyta viðurskiftini hjá starvsfólkunum, uttan at spyrja tey eftir.

– Tað hava vit sagt fyrr og tað standa vit við, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.

Men í løtuni vil hann ikki útgreina hetta meiri.

Hann vísir kortini á, at Starvsmannafelagið er ikki einasta fakfelag, sum hevur fólk í starvi í býráðnum og hann leggur esini afturat, at tað verður arbeitt við málinum.

Hesi feløgini fara nú at tosa saman fyri at vita, hvat gerast skal.

– Samstundis sum starvsfólkið í býráðnum verður skammróst, sleppa tey ikki at vera við til at leggja síni viðurskifti til rættis og tað fer at koma býráðnum aftur um brekkur, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Hann leggur afturat, at viðgerðin í býráðnum hóskvøldið vísti týðiliga, at býráðslimirnir í býráðnum eru viljaleys amboð í hondunum á býráðsformanninum.

# Býráðslimir í Havn reyvrendir

**–Tórshavnar Býráð hevur nú samtykt at seta umstríddar reglar í verk fyri starvsfólkið. Vit eru reyvrend, sigur Elin Lindenskov býráðslimur**

STARVSFÓLKA-POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Hetta kundi verið gjørt meiri elegant, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn*

– Vit eru reyvrend.

Hesi orðini brúkti Elin Lindenskov, býráðslimur á býráðsfundi í Havn hóskvøldið.

Á fundinum hevði býráðið hart orðaskifti um nýggjar reglar, sum ætlanin er at seta í gildi fyri starvsfólkið. Hesar reglar bera í sær, at nú kunnu starvsfólk ikki longur fara til lækna ella tannlækna, ella gera onnur, privat ørindi, uttan at vera drigin í løn.

Og tey sleppa bara at fylgja sínum allarnærmastu, uttan at verða drigin í løn.

Tað var herfyri, at tað kom upp, at býráðið ætlaði at seta slíkar reglar í gildi fyri starvsfólki.

Men eftir at Dimmalætting hevði borið tíðindini, kom røringur í og tað endaði við, at minnilutin í býráðnum kravdi at málið varð tikið til viðgerðar í býráðnum aftur.

Og tað varð tað so hóskvøldið.

Og tá samtykti ein meirluti í býráðnum so at staðfesta reglarnar.

Tað vóru seks atkvøður fyri at staðfesta reglarnar. Tey, sum atkvøddu fyri vóru Jan Christiansen, Beata L. Samuelsen, Schumann Hjaltalin, Jàkup Sune Joensen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen.

Ímóti atkvøddu Leivur Hansen, Jógvan Arge, Finnur Helmsdal og Elin Lindenskov. Men tríggir limir í samgonguni í býráðnum atkvøddi als ikki, teir vóru Torfinn Smith, Bjarti Mohr og Heðin Mortensen.

Tað merkir, at høvdu teir tríggir í meirilutanum, sum ikki atkvøddu, atkvøtt ímóti í staðin, varð uppskotið ikki samtykt.

At málið hevur stóran áhuga sást av, at áhoyraraplássini vóru á tremur við starvsfólki í býráðnum og eisini formaðurin í starvsmannafelagnum hevði leitað sær í býráðið at lurta eftir, hvussu leikur fór.

### Reyvrend

Men tað var ikki uttan svørðslag, at uppskotið varð samtykt.

Tað er ein serstakur ráðgevandi bólkur, ið hevur gjørt reglarnar.

Í tí bólkinum sita Elin Lindenskov, Schuman Hjaltalin og Sjúrður Olsen.

Men Elin Lindenskov segði, at meirilutin í býráðnum hevði reyvrent ráðgevandi bólkin, sum málbar seg.

Hon segði, at bólkurin hevði fingið vissu fyri, at sjálvandi varð onki sett í gildi, fyrrenn teir ymsu starvsfólkaleiðararnir og álitisfólkini hjá starvsfólkunum høvdu havt høvi til at siga sína hugsan.

Og tá ið fíggjarnevndin so aftaná eisini samtykti reglarnar, hevði hon fingið at vita, at málið hevði verið hjá starvsfólkaleiðarunum og álitisfólkunum.

Men síðani er tað komið fram, at tað hevur ongantíð verið lagt fyri starvsfólkaleiðararnar og álitisfólkini.

Sostatt heldur minnilutin í býráðnum, at ráðgevandi bólkurin hevur arbeitt undir skeivum fortreytum og tað er eisini undir skeivum fortreytum, at fíggjarnevndin hevur samtykt málið.

Umboðini fyri minnulutan, sum eru Leivur Hansen, Elin Lindenskov, Jógvan Arge og Finnur Helmsdal hildu tí, at málið skuldi ganga umaftur, tí hendan framferðin kundi ikki góðtakast.

Ongin hevði nakað ímóti, at greiðar reglar vóru, men reglarnar skuldu gerast í samstarvi við starvsfólkini, sum tað rakar.

Jan Christiansen, borgarstjóri viðgekk, at hetta kundi kanska verið gjørt meiri elegant, sum hann málbar seg.

Men hann metti framvegis, at talan var um ein leiðsluspurning og ikki ein fakfelagsspurning.

Hann vísti eisini aftur, at talan var um at broyta starvsviðurskiftini, tí tað var tað als ikki talan um.

Hann segði eisini, at Tórshavnar Býráð var eitt ógvuliga lagaligt arbeiðspláss, har tað bar til hjá starvsfólki at arbeiða skiftandi tíðir.

– So fer onkur privat ørindi í arbeiðstíðini, bar altíð til at arbeiða tað innaftur, so at ongin lønarmissur var. Men tað ber ikki til, har starvsfólkið er tímalønt, legði hann afturat. Hann harmaðist annars um, at tíðindini vóru likin til Dimmuna, tá tað var ikki fyrrenn tá, at rumbul kom í og hann helt, at tað var ógvuliga óheppið, at tíðindi av ymsum slagi lóku úr býráðnum, áðrenn tey áttu at vera almannakunngjørd.

Hann vildi tó hava býráðið at staðfesta reglarnar so at starvsfólk høvdu greiðar reglar at ganga eftir.